# Suðuroyingar og politikara

**– Fiskavirking og Framtaksgrunnurin hava ikki skapt trupulleikan í Suðuroy. Men tað eru politikararnir og suðuroyingar sjálvir, sum hava havt møguleikarnar at loysa teir, sigur Hans Andrias Joensen, nevndarlimur í Framtaksgrunninum**

SUÐUROY OG FRAMTAKSGRUNNURIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað eru ikki Fiskavirking og Framtaksgrunnurin, sum hava skapt trupulleikarnar í Suðuroynni.

Tað sigur Hans Andrias Joensen, nevndarlimur í Framtaksgrunninum.

Og hann sigur, at skulu trupulleikarnir í Suðuroy loysast, eru tað fyrst og fremst suðuroyingar sjálvir og politikararnir, sum hava havt møguleikarnar fyri tí.

Men politikarnir hava onki gjørt og eisini suðuroyingar mugu taka í egnan barm.

Hans Andrias Joensen er rættiliga fortørnaður inn á Hendrik Old og onnur, sum tvinna trupulleikarnar í Suðuroynni saman við Fiskavirking og Framtaksgrunninum.

Og fyri fyrstu ferð tekur ein nevndarlimur í Framtaksgrunninum blaðið frá munninum og svarar teimum ógvusligu álopum aftur, sum bæði politikarar og onnur, hava havt á Framtaksgrunnin og Fiskavirking.

Í Sosialinum hósdagin segði Hendrik Old, at hann var til reiðar at varpa nevndina í Framtaksgrunninum á dyr og at fáa annað fólk í nevndina sum vildi lata virkið í Vági upp, ella vildi selja øðrum tað.

– Sostatt er hann farin upp í kórið hjá Bjarna Djurholm, sum eg havi bestan hug at kalla avtøkumálaráðharra, eftir at hann fyrst avtók alivinnuna og nú eisini ætlar sær at avtaka Framtaksgrunnin.

– Eg kann eg bara siga fyri meg, at eg eri til reiðar at verða varpaður á dyr, sigur Hans Andrias Joensen.

## Kundu strika kravið um at fáa 93 milliónir

Hann minnir á, at Framtaksgrunnurin er ein vinnurekandi grunnur, sum hevur eitt einasta endamál og tað er at fáa avkast av sínum íløgum.

– Framtaksgrunnurin er ikki ein menningargrunnur. Vilja politikararnir, hava ein menningargrunn so skulu teir bara seta ein á stovn og bara hava eina nóg stóra játtan á fíggjarlógini til at gjalda fyri virksemi við, sum gevur hall.

– Vil landstýrið at Framtaksgrunnurin skal taka virknari lut í vinnuni, nú tað brýtur í bæði borð, bæði hjá Framtaksgrunninum og vinnuni, eisini takkað verið einum miseydnaðum vinnupolitiki, kundu teir hóskandi byrja við at slept kravinum um, at Framtaksgrunnurin skal betala landskassanum 93 milliónir aftur nú.

– Við at krevja, at Framtaksgrunnurin skal betala landskassanum 93 milliónir aftur, skerja teir virkismøguleikarnar hjá grunninum munandi. Vildu teir tí havt, at Framtaksgrunnurin skuldi havt ein virknari leiklut í føroyskum vinnulívið, eisini í Suðuroy, kundu teir fyrst av øllum slept kravinum um at fáa tær 93 milliónirnar, tí hetta er helvtin av grunninum, sum nú verður tikin úr honum, sigur Hans Andrias Joensen.

– Hetta verður enntá gjørt ímeðan føroyskt vinnulív er á veg niður av aldukambinum, uttan at vit vita, nær vit eru komin heilt niður í aldudalin.

– Og hetta er ikki ein niðurgongd, sum vit hava nakra sum helst ávirkan á, tí her er talan um lækkaða keypiorku úti í heimi, hækkaðan oljuprís o.s.f.r.

– Eg vil minna politikarar á, at tað er ikki nevndin í Framtaksgrunninum, sum kann gera nakað við, at tað er trupult at reka fiskivinnu á landi. Og tað er altso ikki bara í Suðuroynni tað er trupult at fáa lønsemi í fiskaframleislu.

– Hinvegin eru tað bara politikarar, sum kunnu gera nakað við, at kostnaðurin fyri tær tænastu, sum vinnan má keypa sær, er so dýrur, sum ongantíð fyrr.

– Allar tænastur eru dýrar, bæði orka og aðrar tænastuveitingar til vinnuna. Ikki minst er arbeiðsmegin dýr. Lønarlagið kundi verið lækkað, uttan at lækka keypiorkuna hjá arbeiðsfólkinum. Tað kundi verið gjørt við at lækka skattin. Tað er so ein møguleiki hjá politikarum at hjálpa til at fáa gongd aftur á flakavinnuna og aðrar útflutningsvinnur.

– Kostnaðarstøðið er høgt og tað eru fyrst og fremst politikararnir, sum kunnu ávirka tað, men eisini her hava teir sovið í tímanum og hava onki gjørt fyri at bøta um okkara kappingarførið, sigur Hans Andrias Joensen.



– Ongin hevur havt so góðan møguleika at skapa karmar fyri vinnulívi í Suðuroy, sum Hendrik Old, Bjarni Djurholm og aðrir politikarar, r
í egnan barm. Hví avreiða teir ikki meiri í oynni og hví hava teir selt 6-8 fiskiloyvi av onni seinastu árini, spyr Hans Andrias Joensen, nevnd

Tvørturímóti heldur hann at landspolitikarar kasta alla ábyrgdina frá sær við at leggja fleiri og fleiri málsøki yvir á kommunurnar at umsita.

– Tá ið tíðir versna, verða tað sostatt kommunupolitikarar, sum koma at standa fyri skotum og ikki teir sjálvir.

Hann vísir eisini á, at í nógv ár høvdu vit methøgan fiskaprís og metlága rentu og metlágan oljuprís, samstundis sum vit hava fingið eina innspræning upp á eina góða milliard úr Danmark í hjálp fyri at fáa gongd aftur á samfelagið fyrst í nítiárinum.

– Orsøkin til innspræningina var vánalig politisk stýring og einki annað.

– Men síðan gongd kom aftur á samfelagið hava vit kortini ongar nýggjar útflutningsvinnur fingið og ein orsøk til tað er at politikarar ikki hava skapt tær neyðugu fortreytirnar.

– Tvørturímóti at alivinnan avtikin, tí vinnupolitikkurin sveik og ikki tók trupulleikan upp í rættari tíð.

– Somuleiðis hevur tað almenna gingið á odda at trýst lønarlagið upp. Sostatt eru tað tær almennu lønirnar, sum legga støðið fyri lønarlagnum og tað er bæði óvanligt og óheppið fyri útflutningsvinnuna.

## Varpa Hendrik Old á dyr

Annars Hans Andrias Joensen, at suðuroyingar áttu at umhugsa at varpa Hendrik Old á dyr.

– Alt talar fyri at Hendrik Old ikki er sína uppgávu vaksin. Hann er valdur í løgtingið og har hevur hann sitið í nógv ár. Hann er enntá limur í samgonguni og formaður í vinnunevndini. Tí hevur Hendrik Old havt so góðar møguleikar sum nakar at skapt teir neyðugu karmarnar, so at vinnan í Suðuroy fekk umstøður at virka.

Hans Andrias Joensen vísur á, at politikarar og aðrir suðuroyingar føra fram, at orsøkir til vinnuliga bakkastið í Suðuroy eru flutningskostnaðir og flutningsmøguleikar, bæði innanlands og ímillum Suðuroynna og umheimin.

– Hvør hevur betri møguleika at ávirka flutningskostnaðin enn Hendrik Old og hinir politikararnir, men teir hava latið staðið til í fleiri ár.

– Er tað nakar, sum kann ávirka flutningskostnaðin ímillum Suðuroynna og Havnina, er tað politikararnir, og tá serliga formaðurin í vinnunevndini, Hendrik Old.

– Og hvør hevur betri møguleikar at leggja lunnar undir betri flutning ímillum Suðuroynna og umheimin uttan politikarar og tá serliga formaðurin í vinnunevndini, Hendrik Old

– Men tað hava politikarar ikki gjørt. Tvørturímóti avtóku teir fyri nøkrum árum síðani tað beinleiðis sambandið sum var ímillum Suðuroynna og Skotland.

Í øðrum lagi heldur Hans Andrias Joensen, at vinnan í Suðuroy kann sjálv leggja lunnar undir eitt slíkt flutningssamband.

## Suðuroyingar taka í egnan barm

Og har heldur Hans